H71-StÍF 23-32 (10-12):

# Hugburðurin endurspeglast

**Nú kappingin er farin at líða, tykist stórur munur vera á, hvussu nógva orku liðini leggja í dystirnar**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at fyri fleiri av feløgunum munnu seinastu dystirnir á árinum kennast sum nakað, sum bara skal fáast frá hondini. Eitt nú hjá H71, sum eftir nøkur góð avrik í endaspælinum nú tykist vera steðgað fullkomuliga upp.

Ein orsøk er helst, at liðið sum so ikki hevur nakað at spæla fyri, og móti einum StÍF liði, sum stríðist fyri gullinum, kom hetta týðiliga til sjóndar.

## Hildu ikki dampinum

Tað vóru annars hoyvíkingar, sum byrjaðu dystin betri, og stóran part av fyrra hálvleiki vóru tað eisini teir, sum stýrdu spælinum.

At strandingar tó hava meira at spæla fyri, kom til sjóndar í løtunum upp til steðgin. Teir vistu við sær sjálvum, at dysturin mátti og skuldi vinnast, og tá ferðin so fekk eina eyka tonn, so var einki at gera hjá hoyvíkingum.

Seinni hálvleiki var fyri tað mesta eitt skúladømi um, hvussu stórur munurin millum liðini er, tá annar parturin stríðist, meðan hin bíðar eftir klokkuni, og so kundi tað ikki ganga stórt øðrvísi enn tað sama.

Og einki er at ivast í, at strandingar nú hava sett sær beina kós móti gullinum. Har hevur hon fyri tað mesta verið rættað, men av og á hava frávik verið í stýringini, men hesi tykjast nú vera burturbeind.

Hjá hoyvíkingum tykjast seinastu umførini hinvegin vera nakað, sum bara skulu fáast út av verðini. Innsatsurin í seinna hálvleiki gav í øllum førum ikki ábendingar um, at teir ætla sær at órógva stórt meira.

### Dysturin í tølum

**H71-StÍF 23-32 (10-12)**
Málskjúttar:
H71: Undi Wardum 4(2), Halgir Dahl Olesen 4, Niels Viggo Niclasen 3, Johnny Durhuus 3, Olaf Vestergaard 2(2), Brandur Johansen 2(1), Kristian Eli Zachariasen 2, Anfinnur N. Debess 2, Hans J. Jacobsen 1(1)
StÍF: Costin Dumitrescu 5, Sveinur Justinussen 5(3), Andre F. Danielsen 4, Pauli Hansen 3, Kristjan Petursson 3, Alexandur Johansen 3, Borgar Danielsen 3, Bent Djurhuus 2, Artur Johansen 2, Janus Trygvason 2
Brotskøst: H71 7, StÍF 4
Útvísingar: H71 5, StÍF 4
Dómarar úr Kyndli: Rúni Mohr & Hannis Wardum



*Áki Olsen og VÍF tykjast nú hava sett ferðina upp, og halda beina kós móti einum altavgerandi seinasta dysti um FM-gullið*

KÍF-VÍF 32-38 (14-22):

# VÍF heldur trýstinum

**Við einum sannførandi sigri á kollfirðingum hildu vestmenningar fast um, at seinasti dysturin móti StÍF verður tann avgerandi**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað røkist framvegis fyri, at manshondbólturin í ár endar við eini sannari finalu í Vestmanna.

Mest sum alt árið hava VÍF og StÍF fylgst, og tó at StÍF hevur átt munin í innanhýsis uppgerðunum, so eru teir ongan tíð slopnir leysir av vestmenningunum.

## Full ferð á

Kanska torførasti eftirverandi dysturin hjá VÍF var sunnudagin í Hoyvík, tá teir vitjaðu KÍF, sum í nógvar mátar hevur spælt teimum eitt puss í ár, men hesa ferð var so eingin ivi. Als eingin.

Frá fyrsta bríksli vóru tað nevnliga gestirnir, sum settu ferðina. Helst ilskaðir av negativu umrøðuni, sum liðið hevur havt seinastu vikuna, varð ferðin alt fyri eitt sett upp í hægsta gear, og har megnaðu kollfirðingarnir ongan tíð at fylgja við. Heldur ikki Damir Oros, ið sum vant fekk máltalið upp á ta tveysiffraða, men hetta í sjálvum sær var ikki nóg mikið.

Og sum dysturin leið, so tóktist munurin bara at veksa. Við einari sterkari verju, og annars kvikum mótálopunum minti dysturin til mest sum eina fyrireiking hjá VÍF til seinasta dystin, og kanska var tað júst eisini hetta, sum talan var um. Ein fyrireiking, har VÍF skal venja seg við høgu leikferðina, sum alt árið hevur eyðkent strandingarnar, og í so máta hepnaðist fyrsta royndin væl.,

Undan seinasta dystinum eru tó tveir aðrir á skránni. Tjaldur á heimavølli man tó neyvan vera nøkur avbjóðing, og tó at dysturin móti Neistanum í Havn kann tykjast trupul, so hava innanhýsis uppgerðirnar her bent á, at VÍF so dyggiliga eigur munin.

Tí talar alt í løtuni fyri eini stórslignari finalu í seinasta dystinum, og fyri hondbóltin er tað at fegnast um eftir tvey ár, har gullið hevur verið avgjørt langt undan seinasta leikdegi.

### Dysturin í tølum

**KÍF-VÍF 32-38 (14-22)**
Málskjúttar:
KÍF: Damir Oros 11(4), Petur Martin Poulsen 10, Regin Petersen 7, Vagnur Johannesen 3, Kristjan Madsen 1
VÍF: Agnar Joensen 10, Ingi Olsen 10(3), Áki Olsen 8(1), Ólavur Brimnes 5, Daniel Rápa 3, John Zachariasen 2
Brotskøst: KÍF 5, VÍF 4
Útvísingar: KÍF 5, VÍF 6
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen.

VÍF-Tjaldur 27-15 (16-8):

# Munurin er stórur

**Mununrin millum topp og botn í føroyskum kvinnuhondbólti varð enn einaferð staðfestur, tá BÍF uttan stórvegis hóvasták smurdi Tjaldur av**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var einki at ivast í, at VÍF ætlaði sær bæði stigini, tá Tjaldur vitjaði um vikuskiftið. Hóast meistararnir nú mugu metast sum fyrrverandi, so eiga tær framvegis næst sterkasta liðið í landinum, og hetta varð so dyggiliga undirstrikað sunnudagin.

Kanska var Tjaldur nú ikki tað liðið, sum kundi roknast at geva VÍF stórvegis mótstøðu, og tá VÍF longu eftir fyrsta korterið hevði lagt seg nøkur mál framum, var ikki so øgiliga nógv at tosa um.

Uttan at tær nakran tíð veruliga tóku sær um reiggj, varð munurin javnt og samt øktur, og tó at ferðin á spælinum fór heilt niður í botn seinna umfarið, so kom Tjaldur ongan tíð í aftur dystin.

## Enda niðast

Einasta staðfestingin sum so av dystinum – umframt styrkislutfallið - mundi tí vera, at Tjaldur verður niðasta liðið í kvinnudeildini. Hóast fáur mundi ivast í hesum undan dystinum, so høvdu tær tá framvegis ein teoretiskan møguleika at røkka eitt pláss upp, men nú er hesin so eisini fokin.

FM-møguleikin hjá VÍF má eisini sigast at vera av tí meira teoretiska slagnum. Framvegis eru fýra stig upp til VB, og nú tað bert eru tríggir dystir eftir at spæla, mugu sjálvt ídnastu VÍF-viðhaldsfólkini ásanna, at spælið er tapt.

Enn eru silvurmerkini tó eftir, og to at hesi neyvan smakka eins væl, so er einki at ivast í, at tær gulu ætla at nýta seinastu dystirnar til at staðfesta hesi í.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Tjaldur 27-15 (16-8)**
Málskjúttar:
VÍF: Nikolina Eyðbjørnsdóttir 7, Jackilin Durhuus 7(1), Sóley Mikkelsen 6, Nicoleta Radu 3, Alis Høghamar 1, Fríða Marjunardóttir 1(1), Sára Jógvansdóttir 1, Eyðritt Andresen 1
Tjaldur: Lenka Ribaric 5(2), Milica Ergic 4, Oddvá Fossdalsá 2(1), Turid Lamhauge 1, Heidi Heinesen 1, Mona Langgaard 1, Ann Mari Østerø 1
Brotskøst: VÍF 6, Tjaldur 4
Útvísingar: VÍF 2, Tjaldur 1
Dómarar úr H71: Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen

Neistin-Stjørnan 26-24 (15-12):

# Neistin sleppur ikki endanum

**Hóast tær framvegis eru næstniðast, so hava neistakvinnurnar nú veruliga tikið seg inn í bronsudystin**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast árið eitt skifti sá út til at gerast tað daprasta í søguni hjá kvinnuhondbóltinum í Neistanum, so tykjast leikararnir so langt ífrá hava givið skarvin yvir.

Útlitini vóru annars ikki góð, tá liðið fyri nøkrum vikum síðani tapti útidystin fyri Tjaldri, men onkursvegna tóktist hetta vera júst tað, sum liðið hevði tørv á. Eftirfylgjandi er liðið farið á klintra seg upp eftir stigatalvuni, og tó at støðan framvegis er eitt sætta pláss, so er ein munandi broyting kortini. Nevnliga at liðið hevur lagt seg út í bronsustríðið, har fýra av teimum sjey liðunum í deildini nú eru.

## Simona avgjørdi

Sunnudagin var Stjørnan á vitjan í Havn, og her var rættiliga skjótt greitt, hvønn vegin tað bar. Meðan Neistin seinastu vikurnar hevur havt gott viðrák, tykist mótgangurin hjá Stjørnuni bara at harðna, og longu eftir fyrsta korterið ella so, hevði Neistin skapt sær eitt gott útgangsstøði fyri restina av dystinum.

Fyri tað mesta varð eisini hildið fast um hetta, men tá Stjørnan tíðliga í seinna hálvleiki setti ferð, var um at ganga galið. Fyrst og fremst fingu gestirnir verjuna at rigga betri, og eftir 10 minuttum vóru 18-12 broytt til 19-19, men Neistin hevði ein trumf eftir.

Simona Dziugyte hevur kanska ikki havt so stóran leiklut, sum bæði hon og viðhaldsfólkini kundu hugsað sær, síðani hon kom til Neistan úr júst Stjørnuni, men nú bragdaði. Var ein møguleiki fyri skotið, so smekkaði hon til, og kraftin í hesum er av slíkum slag, at fægstu málverjarnir fáa gjørt nakað. Og mest sum einsamøll megnaði hon hesa seinastu løtuna at toga Neistan frameftir, tó at stinni verjuparturin eisini gjørdi sítt.



*Neistin hevur av álvara fingið glið á seinastu dystirnar, og hóttir nú við at taka seg upp á bronsuplássið í kvinnudeildini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Við sigrinum syrgdi Neistin fyri, at tað nú eru trý lið, sum eru púarasta ájøvn á fjórða plássinum, tvey stig aftan fyri StÍF, sum í løtuni hevur bronsuna í hondini.

Men kanska meira enn nakað av hinum, so eru tær í Neistanum sjálvar førar fyri at gera av, hvussu lagnan verður. Enn eiga tær dyst til góðar móti bæði StÍF og Kyndli, og tó at triði eftirverandi dsyturin er móti VÍF, so kann Neistin við sigri í hinum báðum toga seg heilt upp.

Tað kann Stjørnan eisini framvegis, men so skal vend av álvara koma í. Í endaspælinum hava teir so væl kendu marginalarnir so avgjørt ikki verið í parti við liðnum, sum fleiri ferðir hevur rent seg í tepur tap. Skal støðan broytast, er helst neyðugt við tveimum stigum longu í komandi dystinum, tá Kyndil kemur á vitjan. Teir báðir seinastu dystirnir eru nevnliga ímóti ávíkavist VÍF og VB á útivølli, og á pappírinum eru tað í øllum teir báðir ringast hugsandi dystirnir at hava eftir.

### Dysturin í tølum

**Neistin-Stjørnan 26-24 (15-12)**
Málskjúttar:
Neistin: Simona Dziugyte 11(6), Rakul Augustinussen 6, Christna Holm 4, Súna Mørk 3(2), Jórun Ludvig 1, Lív Sørensen 1
Stjørnan: Danijela Ercevic 10(2), Natasha Stamenkovic 10(3), Joan M. Joensen 3, Una Olsen 1
Brotskøst: Neistin 8, Stjørnan 8
Útvísingar: Neistin 4, Stjørnan 5
Dómarar úr Tjaldri: Trygvi Mortensen & Kári Hansen

VB-Kyndil 26-24 (13-12):

# Nógv stóð á VB

**Gullið hjá VB kemur alsamt nærri, men nervarnir mundu tikið tær av ræði, tá Kyndil vitjaði um vikuskiftið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast VB yvir høvur hevur verið besta kvinnuliðið hetta kappingarárið, so er einki dulsmál, at sterki heimavøllurin hevur verið ein av hornasteinunum í tráðanini eftir oddasessinum.

Soleiðis hevur ikki bara verið í ár. Í lágu høllini við Eiðið kunu áskoðararnir aloftast skapa eina atmosferu, soleiðis at gestirnir veruliga kenna seg á útivølli, og hetta hevur í nógvum førum lyft liðið seinasta pettið móti sigrunum, sum nú loksins tykjast føra gull við sær.

## Bitu frá sær

Tí var heldur einki at ivast í, at VB vóru stórfavorittar, tá Kyndil vitjaði sunnudagin. Fryst og fremst tí VB alt árið hevur havt eitt sera gott tak á Kyndli, og ikki minst tí Kyndil er nakað skert í løtuni, nú Lotte Sørensen ikki er tøk vegna skaða.

Tað bleiv tó ongan tíð nakar sjampanjuhondbóltur hjá heimliðnum sunnudagin. Til tess var spenningurin í dystinum alt ov stórur.

Kyndil var nevnliga als ikki komið suður við nøkrum ætlanum um at leggja seg niður. Hóast Fyrstu løtuna gekst tó ikki so væl, tá tær ikki vóru nóg ansnar, soleiðis at VB fekk nøkur skjót kontra-mál, men eftir hetta fingu tær gott tak á.

Fyrst og fremst royndu tær at sleppa undan at geva ov nógvar bíligar bóltar frá sær, og tá verjan fyrst var komin upp á pláss, var aloftast sera trupult hjá VB at vinna seg ígjøgnum.

Spakuliga otaði Kyndil seg longur og longur fram, og eitt skifti í seinna hálvleiki stóð javnleikur á máltalvuni, men so gekk aftur galið. Ivaleyst var tað eisini so, at orkan ikki var til at savna tankarnar nóg væl um lagda taktikkin, og so hevði VB neyðuga yvirskotið. Mistøkini frá teimum grønu vórðu náðisleyst revsaði, og alt tóktist avgjørt, tá munurin aftur var komin upp á fýra mál.

Men Kyndil gjørdu tó ein seinasta vørr. somikið nógv varð sett á, at munurin fekst niður aftu á tvey mál, men tá so VB í næst seinasta minuttinum økti enn einaferð, var liðugt hjá Kyndli.

## Hepni skal til

Og nú er tað eisin næstan staðfest, at tað eisini er liðugt hjá hinum liðunum. Við sigrinum helt VB í øllum førum fast um leiðsluna í oddinum, har tær eru fýra stig undan restini.

Og við trimum dystum eftir – harav tveir á heimavølli – er ilt at síggja, at tað nú kann kiksa. Hesa ferð vóru nervarnir kanska eisini viðvirkandi til, at støðan gjørdist so spent, men sum ikki einaferð, so megnaðu tær aftur her at koppa marginalunum í sín lut. Ein dygd, sum hevur eyðkent liðið alt árið, og sum kanska er týdningarmesta orsøkin til, at liðið liggur somikið væl fyri. Hepnið vilja summi kanska vera við, men hepnið kemur so ikki av sær sjálvum. Hepnið kemur til tann, sum leitar eftir tí, og annars man tað vera langt síðani, at nakað lið er vorðið føroyameistari uttan nakran sum helst form fyri hepni.



*Tað stóð nógv á hjá VB, men stigini vórðu vunnin, og meistaraheitið er nú bert trý stig burturi*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Dysturin í tølum

**VB-Kyndil 26-24 (13-12)**
Málskjúttar:
VB: Daiva Toumaite 9(3). Reda Kurkauskiene 7(1), Rannvá Augustinussen 6, Mary Krosslá 3, Gurið Mortensen 1
Kyndil: Sonja Smiljic 9(3), Annika Ljósstein 4(1), Ann Mari Wang 4, Iliana Manolescu 4, Jensia Petersen 2, Sabina Frølund 1
Brotskøst: VB 5, Kyndil 6
Útvísingar: VB 1, Kyndil 2
Dómarar úr TB: Kári Niclasen & Birgir Dimon